# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Obama er tann rætti at taka upp arvin eftir John F. Eg kenni á mær, at broytingar eru í luftini (Edward Kennedy)*

# Nú stendur valstríðið millum Clinton og Kennedy

**Nú Edward Kennedy hevur boðað frá, at hann styðjar Barrack Obama, er dysturin um uppstillingina hjá demokratiska flokkinum vorðin ein hólmgonga millum tvey kend nøvn í flokkinum - Clinton og Kennedy**



*Bill og Hillary Clinton á veljarafundi í South Carolina í síðstu viku*

*(Mynd: AP)*

Edward Kennedy kunngjørdi í gjár, at hann stendur undir liðini hjá Barrack Obama í kappingini við Hillary Clinton um uppstillingina til forsetavalið í heyst.

Tann 75 ára gamli senatorurin er tann einasti av Kennedy-brøðrunum, sum er eftir á lívi. John F. Kennedy gjørdist forseti og boðaði frá einum nýggjum tíðarskeiði í amerikonskum politikki. Tann næsti bróðurin, Robert Kennedy, var á veg ímóti Hvítu Húsunum, men báðir gjørdust offur fyri drápsmannakúlum.

Edward Kennedy hevur serstøðu í demokratiska flokkinum, sum hann hevur umboðað í Senatinum í samfull 45 ár. Hann og Clinton-hjúnini eru vinfólk, og upprunaliga ætlaði hann at halda seg uttan fyri valstríðið. Men tá Bill Clinton legði eftir Barrack Obama fyri stuttum, gjørdi Edward Kennedy av at hjálpa Obama. Hann var ikki tann einasti í teirri máttmiklu ættini, sum tók ta støðu. Caroline Kennedy, sum er dóttir John F. Kennedy, hevði skrivað í New York Times, at "sum forseti fer Obama at líkjast pápa mínum".



*Barrack Obama og Edward Kennedy avmyndaðir í Senatinum*

*(Mynd: AP)*

## Broyting í luftini

Tað var aftan á uppstillingarvalið í South Carolina um vikuskiftið, at Edward Kennedy gjørdi av at styðja Barrack Obama. Obama vann stórsigur í South Carolina, men Kennedy gjørdist í øðini, tá Bill Clinton samanbar sigurin hjá Obama við sigurin hjá Jesse Jackson í sama stati í 1984 og í 1988. Samanberingin var ikki røtt, tí Jackson vann tepurt báðar ferðir, meðan Obama vann stórsigur.

Tann 46 ára gamli Barrack Obama hevur verið senatorur síðani 2004, og boðskapur hansara um av savna amerikanska fólkið til eina nýggja byrjan uttan mun til flokslit ella húðalit hevur gjørt, at fleiri samanbera hann við John F. Kennedy.

-Eg kenni á mær, at tað eru broytingar í luftini, segði Edward Kennedy, tá hann í gjár kunngjørdi, at hann styðjar Obama.

Dagin fyri hevði hann ringt til Bill Clinton og greitt honum frá avgerð síni, og sambært amerikonskum fjølmiðlum var orðalagið ikki so vinarligt, tá samrøðan endaði, sum tá hon byrjaði. Edward Kennedy og Clinton-hjúnini vóru ofta saman, tá Bill Clinton var forseti, og tað hendi meiri enn so, at forsetahjúnini hildu frí heima hjá Edward Kennedy í Massachusetts.

# Karzai vil ikki hava Ashdown

**Tann royndi bretski diplomaturin var sjálvskrivaður sum ST-sendimaður í Afghanistan. Nú tekur hann seg aftur, tí afghanski forsetin vil ikki hava hann til Kabul**

Amerikanska stjórnin ivaðist ikki, tá hon fekk eitt uppskot um at góðkenna Paddy Ashdown sum ST-umboðsmann í Afghanistan. Tann royndi bretski diplomaturin var júst tann rætti maðurin at senda til Kabul.

Men afghanska stjórnin vil ikki hava Paddy Ashdown til Kabul. Sambært blaðnum The Times stúrdi afghanska stjórnin fyri, at Ashdown fór at fáa ov nógv vald og ov stóra ávirkan sum ST-umboð.

The Times veit at siga, at nógvir vesturlendskir diplomatar í Kabul høvdu glett seg til at fáa Paddy Ashdown hagar. Hann hevur fyrr verið ST-umboð í Bosnia og fekk sera góð skoðsmál.

Í gjár segði Paddy Ashdown við BBC, at hann hevði tikið seg aftur sum ST-umboð í Kabul fyri ikki at órógva viðurskiftini millum London og Kabul. Bretland hevur næstan 8.000 hermenn í Afghanistan, og Hamid Karzai, forseti, hevur funnist at teimum bretsku og teimum amerikonsku hermonnunum í seinastuni. Forsetin vil vera við, at teir fremmandu hermenninir hava skyldina av, at Taliban er komið fyri seg aftur.



*Paddy Ashdown var sjálvskrivaður sum ST-umboð í Afghanistan, men Hamid Karzai vil ikki hava hann hagar*

*(Mynd: Reuters)*

## STUTT SAGT

### Arbeiði bleiv til fongsul

Herfyri vórðu seks fronsk neyðhjálparfólk dømd átta ár í arbeiðslegu í afrikanska landinum Tjad, tí tey høvdu roynt at smugla meiri enn hundrað børn úr Afrika til Evropa. Við samráðingum eydnaðist tað fronsku myndugleikunum at fáa myndugleikarnar í Tjad at senda seks av teimum dømdu til Fraklands, so tey kunnu sita dómin har ístaðin fyri. Trupulleikin er bara, at eftir franskari lóg er tað bannað at hava fólk í arbeiðslegu, og tí noyðast tey dømdu nú í fongsul ístaðin fyri.

### Smittaði dóttir sína

Løgreglan í norska býnum Drammen hevur skuldsett ein 40 ára gamlan mann fyri at hava smittað sína egnu dóttir við HIV. Tað skrivar blaðið Drammens Tidende. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur við blaðið, at enn leggur løgreglan ikki so stóran dent á at fáa at vita, hvussu pápin hevur smittað gentuna, og um tað møguliga kann verða hent við kynsligari misnýtslu. Tað týdningarmesta er, at maðurin nú er skuldsettur fyri at hava smittað gentuna, sigur talsmaðurin.

### Kvinnur bukaðu gentur

Í seinastuni hevur danska løgreglan staðfest nakrar tilburðir, har ungar gentur hava gjørt seg inn á javngamlar gentur, men um vikuskiftið fekk løgreglan í Køge boð um, at tvær vaksnar kvinnur høvdu bukað tríggjar ungar gentur. Harafturat tóku kvinnurnar fartelefonir, bankakort og lyklar frá gentunum. Løgreglan í Køge tók stutt eftir tær báðar kvinnurnar, sum vístu seg at vera 20 ára gamlar. Genturnar vóru 15 og 16, sigur løgreglan.